Vistfrøðilig ull

# <u>Ull av vistfroðiligum seyði</u>

## Inngangur

Tað, sum eyðkennir vistfrøðiligt seyðahald, er, at tað vanliga gevur meiri av sar enn vanligt seyðahald. Men øll gongdin, tá ið ein vøra verður framleidd, má vera vistfrøðiliga skipað, og ein, sum er góðkendur at geva váttan, má javnan kanna røktina, arbeiðsháttin og pakkingarliðin. Hetta fevnir eisini um vistfrøðiliga ull. Bóndin, vrakarin, flutningsfelagið og tey, ið handfara hana, mugu við skrásetingum og sundurskiljingum vera før fyri at staðfesta, hvaðan vistfrøðiliga ullin stavar.

## Viðgerð

Tá ið seyðurin er kliptur/royttur, eigur ullin at verða hongd úti, so at hon kólnar, áðrenn hon verður goymd. Goymslan eigur at vera rein og turr, og hitin inni í henni eigur at liggja um miðal. Ullin eigur at verða goymd soleiðis, at nóg mikið av luft sleppur til hennara.

Allan vegin má vistfrøðilig ull verða skild frá aðrari ull ella frá vørum, sum møguliga onkursvegna kunnu smitta ella dálka hana. Um bara ein partur av seyðahaldinum er vistføðiligur, eigur roytingin og viðgerðin av vistfrøðiligu ullini at fara fram onkuntíð fyri seg, helst eigur vistfrøðiliga deildin at verða tikin fyrst. Sama geldur fyri tað, sum vrakarin skal gera.

## Posar, pakkitilfar og hvussu vøran verður merkt

Malt verður til at nýta serligar posar, sum framleiðarin veitir. Posarnir mugu vera reinir og turrir og ikki lufttattir. Posar, ið verða endurnýttir, mugu verða vaskaðir við vaskitilfari, sum er loyvt, val og virðiliga skolaðir í reinum vatni og turkaðir, áðrenn teir verða nýttir til vistfrøðiliga ull. Posar, sum skulu nýtast til vistfrøðiliga ull, mugu ikki nýtast til aðra ull ella onnur evni. Teir mugu vera merktir (t.d. V fyri vistfrøðiligt). Vrakarar eiga eisini á sínum merkjum at vísa á, í hvørjum posum vistfrøðilig ull er.

## Goymsla og flutningur

Vistfrøðilig ull má goymast og flytast soleiðis, at hon týðiliga er skild frá aðrari ull ella øðrum evnum. Flutningsfelog mugu tryggja, at bingjurnar og flutningsrúmini eru val og virðiliga vaskað, áðrenn vistfrøðiliga ullin verður flutt, og at hon ikki verður blandað saman við aðrat vørur, meðan flutt verður.

## Skráseting og heimildir

Malt verður til, at bøndur føra dagbók yvir roytingina (t.e. dagur og nøgd). Vrakarar og flutningsfeløg eiga at nýta serlig oyðubløð til vistfrøðiliga ull og týðiliga skráseta, hvør ull, ið er vistfrøðilig, og hvussu mikið, ið er handfarið, og geva bóndanum eitt eintak av oyðublaðnum. Allar hesar skrásetingar, eins og søluskrásetingar, eiga at vera til taks, tá ið eftirlitið kemur at kanna tær.